TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 14.10.2024 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, ~~Kristina Roest, Eyð Jóna Eidesgaard~~

Varalimir: Jens Arni Hammerfoss Leo og Signar P. Dam

Ikki møtt: Kristina Roest, fráboða og Eyð Eidesgaard, fráboða

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| | | |
|---|---|---|
| **Málsyvirlit** | | |
| **Til støðutakan** | | |
| 67/24 | 24/00274-5 | P/F Varðin Pelagic -Náttúrufriðingarnevndin fyri Suðuroyar Sýslu, hoyringarskriv um bygging og útbygging á havnarlagnum á Tvøroyri |
| | | |
| | | |

Kristin Michelsen, borgarstjóri setur fundin, og kunnar um, at Eyð Eidesgaard hevur fráboðað forfall til býráðsfundin. Og at Kristina Roest hevur somuleiðis fráboða, at hon hevur forfall og ynskir at varalimur á list C Javnarflokkurin til kommunustýrisvalið 10. Nov. 2020 møtir fyri seg til eykabýráðsfundin 14. Okt. 2024.

Fyrst (1) valdi tiltakslimurin á lista C Javnarflokkurin til kommunustýrisvalið 10. nov. 2020, ið er Jens Arni Hammerfoss Leo hevur boða frá, at hann kann møta til býráðsfundin.

Og at næst (2) valdi tiltakslimurin á lista C Javnarflokkurin til kommunustýrisvalið 10. nov. 2020, ið er Signar Dam hevur fráboða, at hann kann møta til býráðsfundin

Jens Arni Hammerfoss Leo og Signar Dam hava sitið í býráðnum fyrr og taka sæti uttan atkvøðugreiðslu

Kristin Michelsen, borgarstjóri lesur skránna og spyr um viðmerkingar eru til hesa –ongin viðmerking.

Kristin Michelsen

**Til støðutakan**

**67/24**
**24/00274-5 P/F Varðin Pelagic -Náttúrufriðingarnevndin fyri Suðuroyar Sýslu, hoyringarskriv um bygging og útbýgging á havnarlagnum á Tvøroyri**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 14.10.2024 | 34/24 |
| 2 Tekniska nevnd | 14.10.2024 | 41/24 |
| 3 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 14.10.2024 | 30/24 |
| 4 Býráðið | 14.10.2024 | 67/24 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 8. okt. 2024.**
Tvøroyrar kommuna hevur móttikið hoyringarskriv dagf. 5. okt. 2024 frá Náttúrufriðingar-nevndini fyri Suðuroyar Sýslu, har í kunna verður um, at Náttúrufriðingarnevndin fyri Suðuroyar Sýslu viðgerð í løtuni málini:

***Náttúrufriðingarnevndin fyri Suðuroyar Sýslu skriva, at til viðgerðar eru málini:***

- *umsókn frá P/F Varðanum Pelagic um loyvi til at útbyggja havnarlagið á Tvøroyri og at útbyggja verandi virkisbygning har á havnarlagnum, og*
- *umsókn frá P/F Varðanum Pelagic um loyvi til útbygging av verandi virkisbygningi á havnarlagnum á Tvøroyri.*

Náttúrufriðingarnevndin fyri Suðuroyar Sýslu lýsir somuleiðis í kunngerðartalvuni, at omanfyri nevndu mál, eru til viðgerðar í Náttúrufriðingarnevndini ónsdagin 16. oktober 2024 í fundarhølinum á Politistøðini á Tvøroyri.

Umsitingin hjá Tvøroyrar kommunu vil í hesum sambandi vísa til hoyringarsvarið frá Yvirfriðingarnevndini til Innlendismálaráðið dagf. 9. apríl 2013:

- *"Sagen blev behandlet på møde i Overfredningsnævnet den 2. april 2013, hvor det blev besluttet at meddele, at det fremsendte, ikke giver nævnet anledning til bemærkninger, idet der er tale om et område, som i forvejen benyttes som havneområde"*

Og Skógfriðingarnevndin svarar hin 8. juli 2024 hoyringarskriv frá yvirfriðingarnevndini dagf. 17. Juni 2024:

- *"Skógfriðingarnevndin, hevur á nevndarfundi 8. juli 2024 tikið avgerð um hoyringarsvar frá yvirfriðingarnevndini í málinum um ætlaðu útbygging av havnarlagi á Tvøroyri, ísv at Varðin Pelagic hevur ætlanir um at víðkað virksemi: Skógfriðingarnevndin metir ikki, at ætlaða verkætlanin hjá Varðanum Pelagic í serligan mun fer at hava neiliga ávirkan á skógfriðaða økið kring Tvøroyrar kirkju"*

Umsitingin skal gerða vart við, at byggingin og útbyggingin hjá P/F Varðanum Pelagic á havnarlagnum á Tvøroyri, ið eru til viðgerðar í Náttúrufriðingarnevndini, eru farnar fram samsvarandi galdandi reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, ið eru góðkendar av Umhvørvismálaráðnum samsvarandi heimild í §4 í býarskipanarlógini, har:

Galdandi byggisamtyktarteksturin fyri havnarlagið á Tvøroyri, §29: Øki D 4. er soljóðandi:

1. *Økið verður lagt av til havnaendamál (herundir eisini bátahavnir) og virkir, sum hava samband við skipaferðslu og fiskivinnu og til virksemi, ið hevur samband við tey.*
2. *Byggistigið fyri havnarøkið sum heild má ikki fara upp um 0,3.*
3. *Rúmmálið á húsinum má ikki, uttan serloyvi frá býráðnum, fara upp um 3 m³ fyri hvønn m² av samlaða økinum, ið er lagt út sum havnarøki.*
4. *Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins. Goymslubrunnar kunnu í mesta lagi vera 20 m høgir, og skorsteinar í mesta lagi vera 60 m høgir. Slík hægri bygging skal altíð sendast til almennar hoyringar.*
5. *Bygt má ikki vera nærri bryggjutrom enn 10 m ella nærri aðrari bygging enn 5 m.*
6. *Neystabygging verður ikki loyvd á hesum økinum, og loyvt verður ikki, at verandi neyst verða útbygd. Um eitt neyst verður tikið niður, verður ikki givið loyvið til at byggja uppaftur.*
7. *Býráðið hevur heimild til at gera, ella at geva loyvi til, útfyllingar út á sjógv innanfyri tað økið, sum er lagt út til havnarøki á plankortinum.*

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um náttúrufriðing, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 71 frá 22. mai 2023.

*§ 2. Uttangarðs er ikki loyvt at byggja hús, búðir, skúr ella a.l. uttan loyvi frá friðingarnevndini. Undantiknir eru tó smærri bygningar, sum eftir gomlum siði vanliga hava verið bygdir uttangarðs í samband við landbúnaðin, tá ið teir ikki skemma natúruna.*

8. *Stk. 2. Innangarðs skal ikki at verða bygt uttan loyvi frá friðingarnevndini:*
9. *1) Undir bakkanum frá vallingini og omaneftir og á økir, ið eru upp til 100 m frá bakkatromini, har eingin fjøra er frá meginflóðarmálanum,*
10. *2) nærri enn 300 m frá teimum viðarlundum, ið Føroya viðarlundanevnd hevur um hendi,*
11. *3) nærri enn 300 m frá vøtnum, ið hava størri vídd enn 1 ha og frá áum, ið eru meira enn 4 m breiðar í botninum.*
12. *Stk. 5. Tá ið avgerð skal takast um byggiloyvi, hóast forboðið í stk. 1-2, skal ætlast um, um útsjóndin av ætlaða bygninginum, ella har ætlanin er at seta hann, fer at misprýða í landslagnum ella fer við, ella minkar um útsýnið hjá fólki, eigur byggiloyvi tó at verða givið, tá munandi bygging er farin fram á staðnum innan fyri ásettu mark, um hon er byrjað, áðrenn lógin kom í gildi.*

** **Stk. 6. Áðrenn loyvi verður givið sambært stk. 5, skal friðingarnevndin fáa til vega ummæli frá avvarðandi kommunustýri,** og um so er, at søkt verður um loyvi, at víkja frá tí í stk. 2, nr. 2 fyrisetta forboð, tá eisini frá skógfriðingarnevndini.*

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður hoyringar skrivið frá Náttúrufriðingarnevndini dagft. 5. okt. 2024 latið býráðnum til støðutakan.

Umsitingin mælir til, at Tvøroyrar býráð viðgerð og tekur støðu til hoyringar skrivið frá Náttúrufriðingarnevndini um bygging og útbygging á havnarlagnum á Tvøroyri, vísandi til Løgtingslóg um náttúrufriðing.

**<u>Vinnu- og havnanevndin 14. oktober 2024:</u>**
Nevndin hevur viðgjørt málið, og heldur fast í støðutakanini um at loyva víðkan av havnaøkinum eystureftir, soleiðis sum tað longu er lagt út í byggisamtyktini.
Til byggingina sum longu er farin fram, hevur nevndin ongar viðmerkingar – eftirsum at økið longu er havnaøki, og hevur verið tað í nógv ár áðrenn byggimálini hjá Varðanum Pelagic byrjaðu.

**Tekniska nevnd 14. oktober 2024:**
Nevndin hevur viðgjørt málið, og tekur undir við samtyktini hjá Vinnu- og havnanevndini:
At halda fast í støðutakanini um at loyva víðkan av havnaøkinum eystureftir, soleiðis sum tað longu er lagt út í byggisamtyktini.
Til byggingina sum longu er farin fram, hevur nevndin ongar viðmerkingar – eftirsum at økið longu er havnaøki, og hevur verið tað í nógv ár áðrenn byggimálini hjá Varðanum Pelagic byrjaðu.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 14. oktober 2024:**
Nevndin hevur viðgjørt málið, og tekur undir við samtyktunum hjá Vinnu- og havnanevndini og Tekniska Nevnd: At halda fast í støðutakanini um at loyva víðkan av havnaøkinum eystureftir, soleiðis sum tað longu er lagt út í byggisamtyktini.
Til byggingina sum longu er farin fram, hevur nevndin ongar viðmerkingar – eftirsum at økið longu er havnaøki, og hevur verið tað í nógv ár áðrenn byggimálini hjá Varðanum Pelagic byrjaðu.

**Býráðið 14. oktober 2024:**
Kristin Michelsen borgarstjóri mælir til, at býráðið samtykkir tilmælið hjá Vinnu- og havnanevndin, Tekniska nevnd og Trivnaðar- og umhvørvisnevndin, at halda fast um at loyva víðkan av havnaøkinum eystureftir. Og Borgarstjórin mælir til at býráðið samtykkir fyriliggjandi skriv frá Náttúru-friðingarnevndini fyri Suðuroyar Sýslu, dagft 5. okt. 2024 uttan viðmerkingar.

Atkvøtt verður um tilmælini hjá Kristin Michelsen, borgarstjóra undur einum:
**Fyri eru:** Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer og Jens Arni Leo Hammerfoss
**Ímóti:** ongin
**Blankt:** Signar Dam
Tilmælið hjá borgarstjóranum er harvið samtykt.

Fundurin lokin kl. 17:40

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Jens Arni Leo Hammerfoss

Signar P. Dam